# Kirkjubøar kommuna

Byggisamtykt og býarskipan 1987-99

# Kirkjubøar kommuna

## Byggisamtykt og býarskipan 1987-99

## Innihald:


Byggisamtykt fyri Kirkjubøar kommunu ..... 3
1. gr. Øki, samtyktin fevnir um ..... 3
Umsitingarligar fyriskipanir ..... 3
2. gr. Byggivald, byggiumsókn og byggiloyvi ..... 3
Óbygdu økini ..... 4
3. gr. Tilhaldspláss og bilstøðlar ..... 4
4. gr. Ásetingar fyri øki B: Sethús ..... 4
5. gr. Ásetingar fyri øki C: Vinnuendamál ..... 5
5. gr. Ásetingar fyri øki C1A: Vinnuendamál ..... 5
6. gr. Ásetingar fyri øki D: Havnaøki ..... 5
7. gr. Ásetingar fyri øki D[1]: Ferjuhavn ..... 6
8. gr. Ásetingar fyri øki E: Almennir stovnar ..... 6
9. gr. Ásetingar fyri øki F: Almenn frítíðarøki ..... 6
10. gr. Ásetingar fyri øki G: Neyst og bátapláss ..... 7
11. gr. Ásetingar fyri øki H: Frílendi ..... 7
11. gr. Ásetingar fyri øki H1: Friðað øki ..... 7
12. gr. Ásetingar fyri øki J: Bóndahús ..... 7
13. gr. Ásetingar fyri øki K: Landbúnaður ..... 8
14. gr. Útstykkingar ..... 9
15. gr. Vegir ..... 9
Byggifyriskipandi ásetingar ..... 9
16. gr. Byggingarfráleikar ..... 9
17. gr. Útrokning av nýtingarstigum o.a.m. ..... 9
18. gr. Broytingar í byggisamtyktini ..... 10
Viðurskiftini, sum tey eru ..... 12
Fyritreytir fyri skipanini ..... 12
Bústaðarviðurskiftini ..... 13
Hugsanin og aðaltátturin í skipanini ..... 14
Ferðsluviðurskiftini ..... 14
Kloakkgerð og ravmagnsveiting ..... 14
Trygging og útinning ..... 15
Endamálið við býarskipanini ..... 15
Endamálið við byggisamtyktini ..... 15
Samanhang við aðrar skipanir ..... 16
Samtykt og trygging ..... 16
Kunngerð ..... 16
Avleiðingar fyri fastognarmenn ..... 17
Stigbýting ..... 17
Endurskoðan ..... 17

# Byggisamtykt fyri Kirkjubøar kommunu

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum verða hesar ásetingar at galda fyri Kirkjubøar kommunu.

## 1. gr. Øki, samtyktin fevnir um

**1.** Byggisamtyktin fevnir um bygdirnar Kirkjubø og Velbastað í Kirkjubøar kommunu

**2.** Kommunan verður sundurbýtt soleiðis eftir nýtsluni av økjunum:

**B:** Sethús
**C:** Vinnuendamál
**D:** Havnaøki
**D$^1$:** Ferjuhavn
**E:** Almennir stovnar
**F:** Almenn frítíðarøki
**G:** Neyst og bátapláss
**H**: Frílendi
**H$^1$:** Friðað øki
**J:** Bóndahús
**K:** Landbúnaður

**3.** Økini eru innstrikað á hjálagda korti í máti 1:2000 og frámerkt við avvarðandi bókstavi. Økispartarnir til landbúnað hava tó ongan bókstav.

# Umsitingarligar fyriskipanir

## 2. gr. Byggivald, byggiumsókn og byggiloyvi

**1.** Byggivaldið í kommununi útinnir bygdaráðið.

**2.** Byggiumsókn skal vera skrivlig, og hjálagdar henni skulu vera tær tekningar og aðrar upplýsingar, ið neyðugar eru til greitt at skilja málið.

**3.** Farið kann ikki verða undir arbeiði uttan skrivligt loyvi frá bygdaráðnum (sí tó gr. 13.3 og gr. 14.1).

4. Byggiloyvi eigur eisini at hava tíðarfreist og er bundið av ásetingum og neyðugum treytum.

5. Byggivaldið eigur at fáa boð um nær arbeiðið byrjar, og hvør ið stendur fyri tí.

## Óbygdu økini

### 3. gr. Tilhaldspláss og bilstøðlar

1. Trygd skal veitast fyri, at nóg stórt uttandura tilhaldspláss er til tey, ið búgva og/ella arbeiða í húsinum.

2. Nóg stórt øki skal verða lagt av til bilstøðlar, soleiðis at íbúgvarnir og/ella tey, sum starvast í húsinum og vitjandi, viðskiftafólk, útvegamenn o.o. fáa sett akfarið frá sær á økinum, ið hoyrir til húsini.

3. Vanliga verður kravt í minsta lagi pláss til 2 bilar til hvønn bústað sær. Har felags bilstøðlapláss verða gjørd til fleiri bústaðir ella har talan er um hús til vinnulig endamál, skal góðkenning frá byggivaldinum fyriliggja í hvørjum einstøkum føri.

### 4. gr. Ásetingar fyri øki B: Sethús

1. Loyvt er einans at byggja sethús við upp til 2 íbúðum og – eftir serloyvi frá byggivaldinum – tvíhús, rað- og ketuhús o.t. til eitt húski. Í sambandi við bústaðirnar skal tó bera til at innrætta høli til handlar, onnur vinnuendamál og stovnar, treytað av at hesi virki ikki eru til ampa ella lýta dámin á økinum sum sethúsabýlingi.

2. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 m$^2$ til støddar. Tá ið byggingin verður framd eftir byggiskipan, sum bygdaráðið hevur góðkent og tryggjað ella eftir serstakari byggisamtykt, kann bygdaráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 400 m$^2$, tó í minsta lagi 320 m$^2$ fyri sethús (einhúskishús) og 260 m$^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av teirri ásettu minstuvídd kann verða lagdur burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki.

3. Nettonýtingarsstigið má ikki fara upp um 0,3 fyri einhúskishús og 0,4 fyri tvíhús, ketu- ella raðhús.

4. Hús mugu einans verða bygd í einari hædd við nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 5 m til yvirgrind og 8,0 m til mønuna, mált frá meðaljørðildi (miðal við húsahornini). Kjallaraloftið má ikki vera meira enn 1,0 m oman fyri hægsta jørðildi við húsahorn. Er hæddarmunurin á lendinum, roknað sum munurin millum hægsta og lægsta jørðildi, minni enn 1,5 m er tó loyvt at leggja kjallaraloftið upp til 2,5 m oman fyri lægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallari má vera. Har bygging er fram við vegi kunnu vegmyndugleikarnir áseta hæddina á kjallaraloftinum í mun til veghæddina.

5. Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtingarstig, ið nevnd eru í stk. 3, tá økið verður roknað sum heild.

6. Loyvt verður at umvæla verandi sethús og byggja aftur at teimum, t.d. durur, baðirúm o.t., so tey eru hóskilig til nútímans nýtslu sum sethús.

## 5. gr. Ásetingar fyri øki C: Vinnuendamál

1. Øki verður lagt av til atvinnuvirki, t.e. heilsøluhandlar, goymslur, verkstaðir og ídnað og til tænastuvirksemi í sambandi við tey, bilstøðar o.t.

2. Grundstykki skulu vera í minsta lagi 800 $m^2$ til støddar.

3. Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,5.

4. Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu vera hægri enn 8,5 m yvir miðaljørðildi (miðal við húsahornini).

## 5. gr. Ásetingar fyri øki C1A: Vinnuendamál

5. Øki verður lagt av til vinnuvirki , ið hevur við matvøruframleiðslu at gera og tænastuvirksemi, ið hevur samband við hetta.

## 6. gr. Ásetingar fyri øki D: Havnaøki

1. Øki verður lagt av til havnaendamál (herundir eisini bátahavnir) og virki, ið hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey, bilstøðlar o.t.

2. Byggingarstigið fyri havnarøki sum heild má ikki fara upp um 0,3.

3. Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu vera hægri enn 8,5 m yvir miðaljørðildi (miðal við húsahornini).

4. Bygging til vinnuendamál má ikki verða sett nærri bryggjutrom enn 15 m ella nærri aðrari bygging enn 5 m.

## 7. gr. Ásetingar fyri øki D[1]: Ferjuhavn

1. Øki verður lagt av til ferjuhavn og virki, ið hava samband við farma- og ferðafólkaflutning, og til virksemi, ið hevur samband við tey, bilstøðlar, frásetingarpláss o.t.

2. Bygging kann verða loyvd eftir byggiætlan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, sum er góðkent av bygdaráðnum og Landsverkfrøðinginum.

## 8. gr. Ásetingar fyri øki E: Almennir stovnar

1. Øki verður lagt av til almennar stovnar, til undirvísing, heilsurøkt, mentanarlig og átrúnaðarlig endamál o.t.

2. Innan fyri økispartarnar mugu bara verða gjørd slík virki ella hús, ið samsvara við endamálið hjá avvarðandi økispørtum og tænastuvirksemi, ið hava samband við tey.

3. Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,3.

4. Hús kunnu bara verða bygd eftir eini byggiætlan, sum bygdaráðið hevur góðkent fyri eitt náttúrligt avmarkað øki.

## 9. gr. Ásetingar fyri øki F: Almenn frítíðarøki

1. Øki verður lagt av til ítróttarvøllir, spælipláss, útiverupláss o.t.

2. Innan fyri økini mugu bara verða gjørd virki ella hús, ið samsvara við endamálið hjá avvarðandi økispørtum og tí tænastuvirksemi, ið hevur samband við tey.

3. Hús kunnu bara verða bygd eftir byggiætlan, sum bygdaráðið hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað størri øki.

4. Planting av runnum og trævøkstri kann bert fara fram eftir góðkendari plantingarætlan.

## 10. gr. Ásetingar fyri øki G: Neyst og bátapláss

1. Øki verður lagt av til neystabygging og pláss at seta bátar á.

2. Neyst mugu ikki verða bygd í meira enn einari hædd og ikki vera breiðari enn 4,0 m og hægri enn 4,5 m til mønuna, mált frá lægsta jørðildi. Neyst skulu hava mønu, og skal hon vera í miðjuni, og takhallið skal vera 41,5°. Bygdaráðið kann tó víkja frá hesum ásetingum, um serlig byggiætlan verður gjørd fyri alt ella stóran samanhangandi part av neystaøkinum.

3. Á bátaplássinum er einans loyvt at byggja hús, ið neyðug eru til raksturin, t.d. amboðshús.

## 11. gr. Ásetingar fyri øki H: Frílendi

1. Frílendi, t.e. bøur og lendi, sum ikki má byggjast á. Tað eru lendi, sum løgd eru av til varðveitingar av náttúru, fornminnum o.t. og til at fríðka um bygdina og gera hana dámligari at búgva í.

2. Á teim í 1. stk. fyrr nevndu økjum mugu bert verða gjørdir vegir, gøtur, bilstøðlar, veitingar, garðar o.t. Á teimum einstøku økjunum kunnu verða reistir bygningar, sum skila til virðið á økinum.

3. Loyvi kann gevast til at byggja einstøk úthús sum eru neyðug fyri raksturin av garðsbrúkinum, t.d. seyðahús, og uppdyrkingarvegir kunnu gerast, tá nýtingarætlan er gjørd og góðkend fyri eitt náttúrligt avmarkað størri øki.

4. Útstykking má ikki fara fram.

## 11. gr. Ásetingar fyri øki H1: Friðað øki

1. Øki verður varðveitt av mentunar- og søguligum grundum, soleiðis sum fyriskipað er í løgtingslóg nr. 19 frá 16. september 1948, um friðan av fornminnum og bygningum.

## 12. gr. Ásetingar fyri øki J: Bóndahús

1. Øki verður lagt av til bygging í sambandi við djórahald og jarðarbrúk, og bert er loyvt at hava eini sethús til hvørt festi.

2. Sethúsini skulu annars lúka somu treytir, ið eru galdandi fyri øki B.

3. Útstykking má ikki fara fram.

## 13. gr. Ásetingar fyri øki K: Landbúnaður

1. Øki K er tað, sum eftir er av kommununi, tá ið frammanundan nevndu øki eru tikin frá, og verður tað nýtt til landbúnað, grótbrot, fiskaalistøðir o.a.

2. Loyvt er bert at byggja hús, ið eru neyðug til tess at tryggja fullgóðan rakstur av virkjum við teim endamálum, sum nevnd eru í stk. 1. Tó er loyvt at gera slík teknisk virki og hús, ið neyðug eru til ravmagns- og vatnveitingar, til burturveiting av skarnvatni og til telefon- og telegrafsamband og í sambandi við vegahald.

3. Hús og teknisk virki skulu vera soleiðis til útsjóndar og setast soleiðis í lendinum, at tey lýta landslagið minst gjørligt.

4. Útstykking má ikki fara fram.

### 14. gr. Útstykkingar

1. Útstykking til tey endamál, sum nevnd eru í greinunum, kann bert verða framd eftir útstykkingarætlan, sum bygdaráðið hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað størri øki uttan um avvarðandi grundstykki.

### 15. gr. Vegir

1. Lagdir verða av vegir við leið og legu sum í stórum er tilskilað á hjálagda korti.

2. Bygdaráðnum er heimilað at gera av, hvussu markið millum grundstykki og veg skal greiðast.

3. Mál um bygging fram við landsveg skulu viðgerast sambært ásetingarnar í løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972.

## Byggifyriskipandi ásetingar

### 16. gr. Byggingarfráleikar

1. Øll bygging skal í minsta lagi vera 2,5 m frá grannamarki. Minsta fráleika frá kommunalum vegi ásetur bygdaráðið, meðan landsvegamyndugleikin ásetir fráleikan frá landsvegi.

2. Bilskúr, hjallar og úthús kunnu verða bygd nærri grannamarki eftir nærri reglum, ið byggivaldið setur (brunatrygd).

3. Hesir fráleikar og annars teir, ið umrøddir eru í ásetingunum, verða máldir vatnrætt uttan at rokna við jarðarmuni og hornrætt á markið.

### 17. gr. Útrokning av nýtingarstigum o.a.m.

1. Størsta loyviliga byggingarvídd verður ásett fyri hvørja einastaka grund sum eitt lutfall millum grundvíddina á húsunum og víddina á grundøkinum. Talið, ið soleiðis kemur út, merkir byggingarstigið.

**2.** Størsta loyviliga ummál av byggingini verður ásett fyri hvørja einstaka grund sum eitt lutfall millum bruttohæddarvíddina og víddina á grundøkinum. Talið, ið soleiðis kemur út, merkir nettonýtingarstigið.

**3.** Hæddarvíddin á einari bygging verður útroknað við at leggja saman allar hæddirnar. Málið verður roknað frá útsíðuni á teimum avmarkandi útveggjunum.

**4.** Víddin á tí partinum av kjallarahæddini, ið hevur eina fría hædd, sum er minst 2,30 m, og gólvið liggur yvir lægsta jørðildi, verður roknað uppí við 50%.

**5.** Er eingin kjallari, kann byggivaldið fyri vanlig sethús loyva, at 10% verður lagt aftur at mest loyvdu samlaðu gólvvíddini.

**6.** **a)** Víddin á nýtandi loftshædd verður vanliga roknað sum í mesta lagi 60% av hæddini beint niðriundir.
**b)** Víddin á nýtandi loftshædd, sum hevur eina fría hædd, ið er minst 2,30 m, verður roknað sum víddin á vatnrættum plani 1,50 m oman fyri loftsgólvið, mált innan.
**c)** Er trimpil gjørdur, ið er hægri enn 1 alin, verður loftshæddin roknað sum ásett í stk. b.

## 18. gr. Broytingar í byggisamtyktini

**1.** Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir bygdaráðssamtyktini og við góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

Soleiðis samtykt av Kirkjubøar kommunu

hin 20

Sambært 4. gr., 1. stk., í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, verður frammanfyri standandi uppskot til byggisamtykt fyri Kirkjubøar kommunu góðkent.

Føroya Landsstýri, hin 20

## Viðurskiftini, sum tey eru

Í kommununi eru tvær bygdir, Velbastaður og Kirkjubøur.

Kirkjubøar kommuna hevur mark móti Tórshavnar kommunu fram við Sandá í Havnardali, móti Argja kommunu eystan fyri Syðradal og móti Argja bygd. Eisini hoyrir Trøllhøvdi við til kommununa.

Víddin á kommununi er 3909 ha, av hesum er o.u. 42 ha dyrkað og bygt lendi.

Í báðum bygdum er lending og vegasamband við Tórshavn.

Høvuðsvinnan í kommununi er landbúnaður og urtagarðsbrúk.

At kalla øll jørðin er festijørð, og ogn er einans tann jørðin, ið er frábýtt til grundstykki, og nakrar keyptar traðir.

Í Kirkjubø er kirkja og kirkjugarður, meðan barnaskúli og felagshús eru á Velbastað.

Friðað fornminni eru bæði í Kirkjubø og á Velbastað. Enn er tó bert grivið út av týdningi í Kirkjubø.

## Fyritreytir fyri skipanini

Kirkjubøar kommuna hevði hin 31. juni 1987 173 íbúgvar. Av hesum eru 118 íbúgvar búsitandi á Velbastað. Fólkatalið í kommununi er vaksandi, og er tað serliga á Velbastað vøksturin er, soleiðis sum niðanfyri standandi talvur sýna.

Fólkatalið í Kirkjubø:

| *Ár* | *Menn* | *Kvinnur* | *Íbúgvar tils.* |
|---|---|---|---|
| 1966 | 24 | 18 | 42 |
| 1970 | 25 | 21 | 46 |
| 1977 | 23 | 21 | 44 |
| 1987 | 27 | 28 | 55 |

Fólkatalið á Velbastað:

| *Ár* | *Menn* | *Kvinnur* | *Íbúgvar tils.* |
|---|---|---|---|
| 1966 | 28 | 30 | 58 |
| 1970 | 32 | 31 | 63 |
| 1977 | 36 | 38 | 74 |
| 1987 | 57 | 61 | 118 |

Ársvøksturin í miðal 1966-1987 er 3,48.

## Bústaðarviðurskiftini

Bústaðartalið er vaksandi, og er tað serliga á Velbastað sethús verða bygd.

| Kirkjubø | | Velbastaður | |
|---|---|---|---|
| *Ár* | *Húsarhald* | *Ár* | *Húsarhald* |
| 1966 | 10 | 1966 | 14 |
| 1970 | 10 | 1970 | 15 |
| 1977 | 12 | 1977 | 21 |
| 1987 | 14 | 1987 | 31 |

Ein sammeting av talvunum vísir, at støddin á tí einstaka húsarhaldinum er minkandi úr 4,2 til 3,8 í miðal.

Eftir hesum tølum at døma, er tørvur á fleiri sethúsum. Miðalstøddin á hvørjum húski fer óivað at minka nakað enn, og roknast kann við, at fráflyting verður úr einstøkum gomlum húsum.

Orsakað av teim serligu umhvørvisligu og mentunarligu umstøðum, ið eru galdandi fyri báðar bygdirnar, hevur bygdaráðið víst varsemi við at geva byggiloyvi, tó eru fleiri nýggj sethús bygd á Velbastað síðani 1980, og eru nøkur hús í gerð í Kirkjubø.

## Hugsanin og aðaltátturin í skipanini

Fólkavøksturin, ið er í Suðurstreymoy, hevur eisini havt sína ávirkan á kommununa, men av fyrr nevndu umhvørvisligu umstøðum verður roynt bert at leggja so mikið av til sethúsabygging, at tann náttúrligi vøksturin verður tryggjaður.

Ynskjandi er at byggingin verður samanhangandi, tó soleiðis, at vanlig sethús og hús til landbúnaðin eru sundurskild í bólkar við grasvaksnum lendi uttanum.

Aðaltátturin í skipanini er, at bøur og sermerkt lendi í sethúsabyggingini verða hildin burtur frá hóskandi dyrkilendi. Nýggj fjós og størri bygging annars eigur at verða flutt burtur frá bygdunum, meðan neyðug bygging í sambandi við verandi fjós verður bygd í neyvum tilknýti til hesi.

Mett verður, at eingin tørvur er á at leggja nýggj øki av til almennar stovnar. Kirkjan og skúlin kunnu nøkta tørvin í skipanarskeiðinum og ongar ætlanir eru um at byggja samkomuhús, barnagarð o.t. Verður tørvur á handlum, verða teir helst innrættaðir í sethúsum.

Tey óbygdu økini millum ætlaðu byggingina skulu, til avgerð er tikin um endaligu útsjónd teirra, liggja sum tey eru. Fornminnisgrevstur, planting av trøum og runnum kring vegir og býlingar kann tó fremjast.

## Ferðsluviðurskiftini

Yvirhøvur verður roynt at sleppa frá beinleiðis útkoyringum frá sethúsum út á alfaraveg.

Framhald av vegunum undir Borgarhálsi og á Stórheyggi bera í sær møguleikar fyri framhaldandi bygging á Velbastað.

Sum frá líður verða lagdir gonguvegir í bygdunum, ið samanbinda teir gomlu og nýggju býlingarnar.

## Kloakkgerð og ravmagnsveiting

Flestu húsini hava septikktanga við rørum, sum eru løgd til nærmastu veit. Roynt verður at leggja høvuðskloakkir frá teimum nýggju býlingunum beinleiðis oman móti strondini og verða tvørleiðingar gjørdar til teir gomlu býlingarnar.

Sethúsabyggingin ber í sær, at neyðugt verður kanska at flyta einstakar SEV-linjur og annars leggja nýggjar linjur tøkar til

sethúsaøkini. Fram við ravmagnsveitingunum eru minst 6 m byggilinjur.

## Trygging og útinning

### Lógargrundarlag

Býarskipanin og byggisamtyktin hava tey stevnumið, sum lýst eru í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir nr. 13 frá 21. mai 1954, við seinni broytingum.

Av øðrum lógum, ið hava týdning fyri býarskipan og byggisamtykt, kunnu nevnast:

**1.** Løgtingslóg um náttúrufriðing nr. 48 frá 9. juli 1970.

**2.** Løgtingslóg um friðing av fornminnum og bygningum, nr. 19 frá 16. september 1948.

**3.** Heilsusamtykt fyri tær føroysku bygdakommunurnar frá 9. september 1933 við uppískoyti sambært løgtingslóg nr. 38 frá 5. juli 1973.

**3.** Løgtingslóg um landsvegir nr. 51 frá 25. juli 1972.

## Endamálið við býarskipanini

Endamálið við býarskipanini er at fastseta meginreglurnar í núverandi og ætlaðu skipan og bygging í kommununi. Býarskipanin er fremst ein hent búskaparlig atgerð, sum miðar ímóti at skipa framtíðarbyggingina út frá funktionellum heildarsjónarmiðum.

Býarskipanin skal samstundis tryggja, at verandi bygging, eyðkend eginmerki í landslagnum og dyrkilendi verða vird og møguliga varðveitt. Býarskipanin er ein samantikin yvirlitsskipan, sum sigur frá endamáli bygdaráðsins.

## Endamálið við byggisamtyktini

Endamálið við byggisamtyktini er at fastseta gjøllari reglur fyri framtíðar byggingarviðurskifti á teimum ymisku nýtsluøkjunum og sigur bert í serstøkum førum í staklutum frá, hvussu ein einstakur økispartur skal verða útstykkjaður. Harafturímóti ber til fyri ein

økispart at gera eina lýsingarskipan, ið kann geva hugmyndir, tá ið seinni verður útstykkjað ella møguliga ein serlig byggisamtykt verður gjørd.

## Samanhang við aðrar skipanir

Umframt býarskipanir og byggisamtyktir, sum kommunurnar sita fyri, er ein røð av sektorskipanum, sum hægri myndugleikar greiða úr hondum, sum t.d. (1) vega- og havnalagsskipanir, (2) el-veitingarskipanir, (3) skipanir fyri útbygging av heilsuverkinum o.m.a. Býarskipanin er undirgivin sektorskipanunum og teimum almennu ásetingunum í øðrum lógum, sum avmarka bygging, men er sett yvir innihaldinum í byggisamtyktini viðvíkjandi økisvíddini og nýtslu tess.

## Samtykt og trygging

Býarskipanin og byggisamtyktin skulu verða samtyktar av bygdaráðnum og góðkendar av landsstýrinum.

Býarskipanin hevur ikki í sær sjálvari bindandi rættargildi mótvegis tí einstaka grundeigara ella borgara. Harafturímóti gevur byggisamtyktin kommununi rætt til at ognartaka jørð, sum tað eftir skipanini fer at hava alstóran týdning fyri kommununa at ráða yvir.

Kommunan er skyldug í fyrisiting síni yvirhøvur at fylgja góðkendari býarskipan – og kann tessvegna ikki góðkenna umsóknir um nýbygging og nýgerð, sum koma í stríð við skipanina.

Har, ið ræður um at tryggja tilskapan í staklutum av einum økisparti, kann verða rúmkað um ásetingarnar í byggisamtyktini við at gera serliga byggisamtykt. Hetta kann t.d. koma fyri, har ið ein vil hava nýtt bústaðarøki skapað við felags dámi á húsunum og støðu teirra á grundini, ella har ið talan er um at varðveita eldri býarpart viðvíkjandi útsjónd húsanna: litir, tilfar, umsiting, stórar umvælingar, aftrat- og umbygging, merking o.a.m.

## Kunngerð

Áðrenn uppskot til byggisamtykt verður sent landsstýrinum, skal tað verða lagt fram til almenna eftirskoðan á staði, sum er høgligt hjá íbúgvunum, í 3 vikur í minsta lagi, aftaná at hetta hevur verið almannakunngjørt.

Møgulig mótmæli og broytingaruppskot til uppskotið til byggisamtykt skulu vera kommunustýrinum í hendi áðrenn 3 mánaðir eru gingnir frá kunngerðardegnum.

Mótmæli og broytingaruppskot, sum kommunustýrið ikki samtykkir í, skulu fylgja við uppskotinum, tá ið hetta verður sent landsstýrinum til góðkenningar.

Um so er, at byggisamtyktin hevur ásetingar fyri nakrar fáar ognir, kann byggisamtyktin verða tinglýst.

## Avleiðingar fyri fastognarmenn

Býarskipanin ella byggisamtyktin kann ikki áleggja einum fastognarmanni at broyta nýtslu av ogn síni, sjálvt um hon er á øki, sum skipanin sigur skal nýtast á annan hátt.

Einki er kortini til hindurs fyri, at t.d. á bústaðarøkjunum kunnu stovnast smáir handlar til at veita fólki á staðnum dagligar nýtsluvørur ella smá virki, sum ikki eru til bága fyri tey, sum búgva uttanum.

Tá ið vissar fortreytir eru, sum greindar eru í lógini, kann fastognarmaður krevja, at tað almenna yvirtekur ogn hansara, alla ella ein part, móti endurgjaldi.

## Stigbýting

Til tess at tryggja ein tílíkan vøkstur, at býurin (bygdin) støðugt er ein heild, hevur býarskipanin eina býting í stig, t.v.s. frágreiðing um, í hvørjari raðfylgju økini eiga at verða bygd. Nær gingið verður frá einum stigi til annað, fer eftir, hvussu skjótur vøksturin er.

Umframt teir fyrimunir, sum útbygging í stigum ber við sær, eru eisini teir fíggjarligu fyrimunirnir eyðsýndir, við tað at keyp av øki, gerð av nýggjum vegum, veitingarleiðingar og kloakk bert verða gjørd, so hvørt tørvur er á tí og fáastaðni í senn.

## Endurskoðan

Skipanin er framhaldandi arbeiðslag. Til tess at gera býarskipanina til eitt veruligt arbeiðsamboð fyri kommununa, er neyðugt við jøvnum millumbilum – og minst eina ferð í hvørjum valskeiði – at taka hana upp til metingar og møguliga umbøting. T.d. kunnu fortreytirnar fyri støddini av teim avløgdu økjunum broytast eftir fáum árum.

Broyting av býarskipan og byggisamtykt verður at gera eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri gerð av nýggjum býarskipanum/byggisamtyktum.